LM-098/2022

FØROYA KÆRUSTOVNUR

Tórshavn: 20. februar 2023
J.Nr.: 23/04904
(at tilskila í svari)

Viðgjørt: AH/-

Uttanríkis- og vinnumálaráðið
Tinganes
Postrúm 377
110 Tórshavn

Att: Unn A. Krákustein, fulltrúi

Uppskot til løgtingslóg um kapping - hoyring

Víst verður til teldupost frá 16. februar 2023, har omanfyri nevnda uppskot verður sent til hoyringar. Kærustovnurin avmarkar viðmerkingar sínar til bert at snúgva seg um kæruviðgerðina.

Í uppskoti til løgtingslóg um kapping, er § 32, stk. 5 orðað soleiðis: *"Føroya Kærustovnur skal taka avgerð í málinum í seinasta lagi 8 vikur eftir, at málið er lagt fyri nevndina."* Í viðmerkingunum til greinina verður sagt, at ásett er tíðarfreist til viðgerð av kærumálum vegna atliti til tann, sum kærir.

Kærustovnurin virkar fyri og tekur sjálvandi undir við, at mál eiga at avgreiðast so skjótt sum til ber. Men tá kærumál eftir kappingarlógini oftast eru torgreidd og umfatandi og hædd eisini skal takast fyri hoyring av pørtunum, er trupult at halda slíka stutta freist.

Tað eru ikki viðgjørd nógv mál um kapping, síðan kærumøguleikin var fluttur til Føroya at viðgera. Men hvørja ferð eitt slíkt mál kemur um dyrnar, ger Kærustovnurin alt fyri at skunda hetta ígjøgnum. Onnur mál verða sett til síðis, partarnir fáa stuttar freistir og fyrireikingin av málunum byrjar, áðrenn tað er fult upplýst. Hetta órógvar ikki bara annað arbeiði á stovninum, men vandi kann vera fyri, at feilir verða gjørdir og at kæruviðgerðin ikki verður nøktandi, tá slík ferð skal vera á málsviðgerðini.

Tá talan harafturat ofta er um mál, sum Kappingareftirlitið hevur arbeitt við í langa tíð, gevur tað lítla meining at skunda slík mál ígjøgnum eina kæruviðgerð. Tí verður heitt á tykkum um at fáa broytt uppskotið til kappingarlóg soleiðis, at henda freist verður strikað.

Viðmerkjast skal eisini, at nú Vinnukærunevndin er niðurløgd og Kærustovnurin viðger kærur eftir lóg um kapping, eigur "nevndina" helst at broytast til "Kærustovnin".

Vinarliga

Føroya Kærustovnur

Anja Hovgaard, stjóri

UNDIR HORNABAKKA • POSTSMOGA 45 • 110 TÓRSHAVN
TELEFON 32 05 85 • TELDUPOSTUR FKS@FKS.FO